# Tað regnar framvegis

**Rockbólkurin All That Rain er framvegis virkin á konsertum og til dansitiltøk. Stóri dreymurin er at gera eina nýggja útgávu, men eftir fleiri broytingar í manningini snýr tað seg nú fyrst um at spæla nýggja bólkin saman**



*Banjamin Petersen er nú gittarspælari í All That Rain, og teir gomlu limirnir í bólkinum er sera fegnir um at hava fingið hann við*
*Mynd: Petur Elias*

**Eyðun Klakstein**
**eydun@sosialurin.fo**

Bólkurin All That Rain hevur verið virkin á føroyska tónleikapallinum síðani desember mánað í 1999.

Og tað regnar framvegis.

All That Rain hevur júst fingið nýggjan gittarspælara, og fyri ikki so langari tíð síðani fekk bólkurin eisini nýggjan sangara.

– Vit hava sjálvandi havt ætlanir um útgávu rættiliga leingi, men hendan útskiftingin, sum hevur verið í seinastuni, ger at tað er tungt at fóta sær aftur, og tekur nógva tíð at samansjóða bólkin aftur eftir útskiftingarnar, sigur Henning Nicodemussen, sum er annar av upprunaligu tónleikarunum, sum er eftir í bólkinum.

## Fleiri broytingar

Tá ið All That Rain byrjaði at spæla í 1999 vóru tríggir tónleikarar í bólkinum. Teir høvdu allir spælt við Kjølum frammanundan.

Fyrstu tíðina var tað gittarspælarin Jens Marni Hansen, sum sang í bólkinum, og hann er eisini oddafiskur á tí mesta av útgivnað tónleikinum hjá bólkinum.

Í august mánaði 2001 fór Jens Marni úr bólkinum, og síðani hava tríggir sangarar roynt seg. Fyrst var tað nýggi gittarspælarin Hans Ravnsfjall, sum sang og spældi, síðani kom fyrrverandi sangarin í Týr, Pól Arni Holm, upp í bólkin, og síðsta árið hevur Rókur Jakobsen verið sangari í bólkinum. Hann hevur áður roynt seg í eitt nú Tangz og MC Hár.

## Nýtt skot á stammuni

Nýggjasta skotið á stammuni í All That Rain er blaðungi gittarspælarin Benjamin Petersen. Hann hevur spælt við All That Rain í eina tíð, og tað eru gomlu limirnir í bólkinum sera fegnir um.

– Hann er ótrúliga dugnaligur og energiskur. Hansara spæligleði dregur okkum á eitt heilt annað støði, tað virkar sum allir tíma nógv betri nú, sigur Henning.

Sangarin Rókur Jakobsen er í holt við eitt soloprojekt, og har er Benjamin eisini við.

## Spæla bólkin saman

All That hevur spælt til ymisk tiltøk seinastu tíðina, og teir hava eisini ymsar framførslur fyri framman.

– Vit hava fyri tað mesta vant kopiløg, mest sum fyri at samanspæla bólkin og læra hvønnannan at kenna. Men vit hava eisini nortið við tilfar hjá okkum sjálvum, sum vit eisini framførdu fyri umboðum frá SPOT-festivalinum herfyri, og tað er faktisk rættiliga spennandi, sigur Henning.

All That Rain skal spæla til jólatiltøk og annað næstu tíðina, men teir leingjast eisini eftir at spæla sítt egna tilfar á konsert.



*Nýggja manningin í All That Rain venur nógv kopiløg fyri at samansjóða bólkin, men teir tríva eisini í egnar sangir*
*Mynd: Petur Elias*



*Bólkurin All That Rain hevur verið virkin í seks ár, og teir venja framvegis dúgliga saman og eru úti og spæla til ymisk tiltøk*
*Mynd: Petur Elias*